Góðu áhoyrarar,

Sambýlið á Mýruvegi her í Klaksvík, er av sonnum ein sólskinssøga á almannaøkinum. Tað eru tíverri ikki sólskinssøgurnar, sum stjala tær stóru yvirskriftirnar í miðlunum. Tann góða og positiva søgan verður sum oftast tagd burtur. Og tað er stórt spell, tí vórðu tær ikki tagdar burtur, hevði tað ikki gingið ein vika uttan at vit hoyrdu um flaggskipið á almannaøkinum her á Mýruvegi í Klaksvík.

Nú hugsar sikkurt onkur tykkara, ja enn politikari, sum brúkar flottar og slitnar vendingar, sum "flaggskip og sólskinssøgur".

Men eg meini veruliga hvørt orð.

Eg havi áður sagt alment, at mín dreymur og visjón sum landsstýriskvinna er, at borgarar við serligum avbjóðingum, sum hava tørv á at koma á ein stovn, sleppa á ein stovn, sum er bygdur til teirra tørv. Hesin dreymur og  henda visjón er veruleiki her í Klaksvík, tí sambýlið á Mýruvegi, er jú tað fyrsta og einasta í Føroyum, um hyggja vit burtur frá Eirargarði í Havn, sum er bygt til endamálið.

Tað ger sambýlið til eina fyrimynd,  sum vísir eina greiða kós, hvussu vit á almannaøkinum eiga at skipa økið framyvir.

Síðan hugnaliga og rúmliga sambýlið lat upp fyri 10 árum síðan, hevur tað verið ein tryggur karmur – eitt akker – í gerandisdegnum hjá húsfólkunum her á Mýruvegi. Týdningurin av hesum kann ikki undirmetast. Undir tryggu kørmunum á Mýruvegi eru nøkur aktiv og røsk húsfólk, ið takast við nógv ymisk ítrív. Virknu húsfólkini gera alt frá at ganga til skótar, boccia, svimjing, matgerð, til at brúka tíð uppá gongutúrar, og at vera á varda verkstaðnum uppi á Brekku.

Tá fyrireikingarnar í síni tíð vórðu gjørdar til at byggja sambýlið, vóru mong, sum hildu, at stovnurin fór at standa tómur. Nú 10 ár eftir, kunnu vit róliga staðfesta, at hesir fordómar eru gjørdir dyggiliga til skammar. Stovnurin fyltist skjótt, og fólk fingu veruliga eyguni upp

fyri tørvinum á einum slíkum sambýli. Og væl hevur hilnast, tí nærum øll húsfólkini hava búð her øll árini.

Henda sólskinssøgan í hjartanum av Klaksvík, har stutt er til svimjihøllina, badmintonhøllina KÍ høllina, ja enntá ikki so langt frá sjálvum Húkinum, hevði ikki latið seg gjørt uttan dugnalig starvsfólk, sum veruliga brenna fyri økinum. Tit hava við góðum og tøttum samstarvi við húsfólkið og avvarðandi gjørt tykkara til, at virksemið á Mýruvegi er vorðið so áhugavert og fjøltáttað sum tað er. Eldsálirnar her á staðnum gera eitt rimmar arbeiði at tryggja húsfólkunum eitt tilhaldsstað, sum er við til integrera tey á jøvnum føti við onnur í samfelagnum.

Tað er einki dulsmál, at Klaksvíkar kommuna vísti fyrimyndarliga samstarvsvilja, tá ið sambýlið varð bygt fyri 10 árum síðan. Nú stendur kommunan aftur fyri einari stórari avbjóðing, nú farið verður undir at byggja fleiri bústaðir her í Norðoyggjum. Eg havi alla orsøk til at vóna og vænta, at sami samstarvshugur fer at gera seg galdandi hesaferð. Og verður úrslitið líka gott sum fyri 10 árum síðan, ja so verður enn eitt sambýli í norðoyggjum eitt flaggskip á bústaðarøkinum. Og hví skal tað ikki gerast tað, kunnu vit spyrja?

Húsfólk, starvsfólk og avvarðandi, hjartaliga til lukku við 10 ára føðingardegnum. Stóra takk fyri, at eg kundi sleppa at siga nøkur orð her í dag. Vónandi fái eg høvi at støkka inn á gólvið aftur eina aðru ferð. Skilji á lagnum, at fleiri húsfólk eru farin at ganga til matgerð, so hvør veit, kanska kann eg koma norður á Mýruveg at fáa mær ein leskiligan bita frá tykkum onkran dagin? Bjóða tit mær til døgurða, ja so taki eg mær sjálvandi av uppvaskinum aftaná. ☺

Enn einaferð hjartaliga til lukku!

Annika Olsen, landsstýriskvinna í almannamálum.